*FISKIMARKIÐ*

# »... Føroyar vuksu til vídd og mæti við verk og vísindi miðamansins«

Í hesum døgum tingast Føroyar og Bretland um markið millum londini bæði. Fyrst í sjeytiárunum fluttu strandalond fiskimarkið út á 200 fjórðingar. Á leiðum millum lond, ið vóru styttri enn 400 fjórðingar, skuldi miðlinjan vera mark. Miðlinjan millum Føroyar og Bretland er ongantíð endaliga ásett. Semja er ikki um, hvar henda linja skal setast. Føroyingar halda seg til miðlinjuprinsippið út frá okkara beinu grundlinjum. Í dag umskarast tann linjan, sum bretar krevja og tann, sum føroyingar krevja við eini gráari leið ímillum. Bretar siga seg hava krav um mark longur norður á føroyska landgrunnin. Men hvat er í roynd eitt mark á sjónum? Hvussu hava hesi mark gjøgnum tíðirnar verið sett og hvussu hava tey verið vird? Hesum greiðir okkara serfrøðingur í havrættarmálum, vágbingurin Dánjal Nolsøe frá í dag. Meðan tað áður bert var talan um fiskatilfeingi í tí havøki, fiskimarkið fevndi um, er nú talan um ráevni í undirgrundini. Og oljan er dýr!

***Pól á Kletti***

Tað var gamalt, at handilssæti kannaðu sær havleiðir, sum teirra menn nýttu í sigling og handilsskapi og vóru fyrstir um, eitt nú Týrus í Fønikia, síðan var tað Athen í gamla Hellas og Kartago og eisini aðrir býir báðumegin Miðjarðarhavið, so trongligt var tá ið Róm fór at taka til sín, og tað mundi ikki heldur vera uttan grund, at fyrsta royndin at fáa tjóðir at ganga undir reglu um frítt hav kom haðani. Men tá ið Róm hevði lagt Egyptalandi undir seg ár 30 f.o.t., vóru rómverjar fyrstir at kanna sær Miðjarðarhavið sum sítt hav (Mare Nostrum = okkara hav).

Og upp gjøgnum miðøldina vant tað upp á seg at leggja undir seg havleiðir, á odda vóru stóru handilsstaðirnir í Italia – Venedig: Adriatarhavið, Genova: Liguriska Havið. Fyri norðan kannaði Noregs kongur og seinni hinir dansk-norsku kongarnir sær havið alt millum Noregs og Grønlands. Hildið var, at Grønland var landfast við Bjarmaland (Rusland) og Noreg; botnurin á hesari almiklu buktini var tann í kvæðunum tiltikni Trøllabotnur, ið má ætlast at vera núverandi Svalbarð. Soleiðis verður tikið til um Gongu-Rólv tá hann við knørri sínum á ferð norðuri í havi viltist av leið:

*Tá tók at bendast í breiðum báti,*
*skulvu borð og bitar,*
*viltust norð í Trøllabotn*
*har gekk teimum súrt við slitur.*

Og seinni...

*Seks vetur var hann í Trøllabotnum*
*út í risans runni,*
*inntil tann hin gevndu,*
*tá legði hann ást við Svannu.*

Danmarkar kongur kannaði sær Eystrasalt, og sum norskur kongur kannaði hann sær rættin til gamlan norskan sjógv, havleiðirnar millum Noreg, Føroya og Íslands. Tí var tað, at Eirikur kongur úr Pommern í 1429 legði toll á hvørt skip, sum legði leiðina gjøgnum Oyrasund inn í Eystursjógvin. Hesin tollurin varð róptur oyrasundstollurin og varð kravdur til 1857, tá ið lond gingu undir at rinda 60 mió. kr. einaferð móti at Danmark helt siglingarleiðina við vitum og øðrum leiðvísarum. Kronborg stendur har mót munnanum sum minni um eitt kongaligt lunnindi í 430 ár.

Fyrst at leggja undir seg tær stóru havvíddirnar í Atlantshavi vóru Spánia og Portugál. Christoffer Columbus var fyrstur um hav til Vesturindia í 1492. Hann var føddur í Genova, men gjørdur út í Spánia. Vasco da Gama fór suður um Afrika í 1498 og Magellan suður um Amerika 1520. Teir vóru báðir portugálsmenn, og tí kannaði Portugál sær teirra farleiðir – tær syðru havleiðirnar sum Spánia tær norðaru.

Tá ráddi um sigling og handilsskap; men teir, sum kannaðu sær sjógvin sum fyrstir á honum, vóru tó einki langt skifti einsamallir á honum. Sjóræning var gamal og gyltur vinnuvegur, og haraftrat var kapring lógligur vinnuvegur; kongur gav monnum loyvisbræv at sigla sum kaparar; í 1856 var hesin vinnuvegur forbjóðaður við millumlandasáttmála, sum undirskrivaður var í París.

Í hesum sambandi kunnu tveir mans, sum vóru at kalla javnaldrar og líkir í so mongum lutum: bretin Francis Drake (1540-96) og føroyingurin Magnus Heinason (1545-89) nevnast. Drake reikaði víða um høv, næstur Magellan runt knøttin og gjørdi spániumonnum miklar ónáðir sum sjórænari og hevði heimaftur gyltan farm av sponskum gulli og dýrgripum, ríkaði Elizabeth drotning upp, og tað var í grundini hann, sum við sínum listum gjørdi enda á tí stóra flotanum, sum Spánia skuldi nýta til innrásina í Onglandi 1588. Magnus Heinason hevði mong brøgdini á baki, tá ið hann noyddist av landi og fekk sær tilhald í Enkhuysen í Norðurhollandi í 1585-87. Longu 7. juni 1858 fekk hann kaparabræv frá Moritsi av Orania. Mistók seg í fyrstu atløgu, men gjørdi skjótt kvettið, legði eftir enskum farmaskipi, skipaði farmin inn í sítt egna skip, *Svanin*, og fór til Bergens við honum, men ilt stóðst av hesum vinnuvegum.

Norðaru provinsirnar í Hollandi høvdu tikið við arvinum eftir teir gomlu frísarnar sum siglandi menn og í handilsskapi; í 1600-árunum var skipaflotin stórur, ikki færri enn 900 størri handilsskip og eini 3000 fiskiskip, men ræsurnar vóru trongar. Tað var tí náttúrligt, at spurningurin kom upp av álvara um frítt at fara um høv júst í Hollandi.




### Frælst hav og stongt hav

Tað var hollendingurin Hugo Grotius, føddur í 1583, rætslærdur og heimspekingur, sum við verki sínum Mare liberum í 1609 ruddaði slóð fyri orðaskiftinum um fræls rættindi hjá londum á havinum.

Aftursvar fekk hann úr Onglandi frá John Selden, føddur í 1584, ið eisini var rætslærdur og heimspekingur, við verkinum Mare clausum, sum kom út í 1635, eitt verk, sum var nýtt tá ið Ongland setti stongsulin fyri siglingini (The Act of Navigation) í 1651, sum stóð við í eini 200 ár (loyvt var bert útlendskum skipum at flyta farm úr egnum landi).

Vágbingurin Dánjal Nolsøe, fyrrv. landsrættardómari, er serkønur í havrættarmálum. Hann hevur tikið lut í øllum teimum trimum havrættarstevnunum, sum ST hevur fyrireikað (í 1958, 1960 og seinast árini 1972-82), alla tíðina umboðandi Føroyar. Og hann er limur í teirri felags føroysku-donsku nevndini, sum nú tingast við bretar um markið millum Føroyar og Bretland. Dimmalætting hevur vent sær til hansara at fáa marknahugtakið greinað og greiða frá, hvønn týdning, tjóðir upp gjøgnum tíðina hava lagt í hetta at seta mark á sjónum.

– »Mare clausum« og »mare liberum« eru tvey orð úr teirri tíðini tá ið latín var felags ritmál hjá vísindamonnum. Tey lýsa aðalgongdina í hinari europeisku sjómarkssøguni. Beinleiðis týdd merkja tey »stongt hav« og »frælst hav«. Í 16. og 17. øld fór hugsjónin um »frælsi á havinum« at taka seg upp, eina mest tí, at tað nú var stórveldunum meira at gagni at sigla óhappað til Amerika og onnur nýggj lond handan hav enn at hava einarætt til høvini heima í Europa. Tað hóskaði ikki saman at krevja mare liberum úti hjá øðrum og mare clausum heima hjá sær sjálvum. So líðandi minkaði hitt stongda heimahavið inn til eitt mjáari belti fram við landi, ið fekk navnið sjóterritorium, sigur Dánjal Nolsøe.

Snúgva vit okkum til fiskirættindini í eldri tíð, dagar eitt tvørdømi undan. Hesi rættindi fylgja ikki leiðini frá mare clausum til mare liberum. Í miðøldini og langt upp í nýggjari tíð – við øðrum orðum í mare clausum tíðini – var hin almenna reglan í Europa, at fiskiskapur heilt inn í klettin var loyvdur einum og hvørjum, útlendingum eins væl og innlendingum. Ikki fyrrenn í mare liberum tíðini kom fiskiskapur innan mark at vera bannaður fyri útlendingar.

– Tá ið felagsmarknaðarlondini – nú ES – vildu taka av øll fiskimørk sínámillum til eitt felags búskaparligt øki, við ávísum, avmarkaðum undantøkum, hevur ein tílík skipan sostatt gamlan søguligan botn í Europa. Men gloymast má ikki, at hin gamla europeiska reglan um fiskifrælsi á havinum alla tíðina hevði undantøk. Norðastu londini í Atlantshavi hava ongantíð játtað úlendingum fult fiskifrælsi. Hesi undantakslond eru frá gamlari tíð Noreg og tess hjálond í Atlantshavi (Ísland og Føroyar) og Skotland og skotsku oyggjarnar, sigur Dánjal Nolsøe.

Hann vísir á, at orsøkin til hetta er, at fiskiskapurin hjá fólkinum í hesum londum hevði ein heilt annan týdning enn hjá fólki yvirhøvur í Danmark og í Onglandi. Ein týðandi partur av útkomuni hjá norðbúgvum og skotum var úr sjónum. Fiskiskapur var ikki ein hjávinna hjá hesum fólki sum hjá dønum ella ein ídnaður millum annan ídnað, sum talan var um ávísum enskum býum í miðøldini. Norðmenn, føroyingar, íslendingar og skotar høvdu teirra dagliga yrki á sjónum. Her fingu teir sítt dagliga breyð.

Henda serstøðan hjá teimum kørgu londunum fyri norðan hevur havt avleiðingar heilt upp í okkara tíð. Norski altjóðaløgfrøðingurin Arnold Ræstad sigur hesa serreglu hava norskan uppruna og er komin til Skotlands við norskum innflytarum. Stórsøguligan týdning fekk hon, tá ið Skotland og Ongland í 1603 gjørdust eitt ríki undir Jákupi kongi I. Eins og onnur europeisk lond hevði Ongland játtað útlendingum fiskifrælsi. Helst eftir skotskum fyridømi setti Jákup bann hjá fremmandum at fiska við Onglands strendur.

Hetta íspann eitt aldargamalt stríð við fleiri bardøgum millum Ongland og Holland, sum frá gamlari tíð hevði ríkið fiskiskap undir Onglandi, serliga eftir sild. Tann hollendski fiskiflotin var risastórur, í minsta lagi 2.000 skip við 20-30.000 fiskimonnum umborð, og hann fiskaði heilt norður til Hetlands.

Dánjal Nolsøe sigur, at hesin hollendski fiskiskapurin undir bretsku oyggjunum kom óbeinleiðis at fáa týdning fyri Føroyar.

### Vernd móti útlendskari veiði

– Hin bretski fiskiskapurin í Norðuratlantshavi er gamal og hevur ið hvussu er verið í fimtandu øld. Tað tykist sum onglendingar hava mest leitað til Íslands og skotar mest til Føroya. Dømi eru um, at hesin fiskiskapur undir Føroyum hevur vundið uppá seg fyrst í seytjandu øld, um sama mundið sum stríðið millum bretar og hollendingar tók seg upp, sigur Dánjal Nolsøe og vísir á, at føroyingar í 1615 skriva Christiani IV bræv við umbøn um verju móti enskari og skotskari ránsveiði nær landi – á firðum og sundum.

Chr. IV vendir sær til Jákups I, sum legði málið inn fyri hitt skotska ráðið (»The Privy Council of Scotland«). Ráðið stevndi saman umboðsmonnum fyri teimum skotsku býunum, sum plagdu at luttaka í føroyafiskiskapinum. Upplýst var, at skotar fóru til Føroya av neyð, tí at hollendingar komu við 2.000 skipum um árið og fiskaðu inn til eina míl frá Orknoyum og Hetlandi.

Munur var á fiskiskapi undir Íslandi og undir Føroyum. Enskir fiskimenn kundu av longum royndum halda, at fiskiskapur undir Íslandi var fríur, men skotskir fiskimenn afturímóti vistu heimanífrá, at so var ikki undir Føroyum, og tað fingu føroyingar svart uppá hvítt í forboðnum, sum Jákup kongur í 1618 gav skotum móti at fiska undir Føroyum innan fyri landkenning (samb. »Proclamation prohibiting the Scottish liegies from fishing within sight of the Isle of Faroe«), av tí, at hesin fiskiskapur samb. fólkarættinum bert mátti takast av íbúgvum Føroya og øðrum tegnum danska kongsins. Hetta hóskar væl til gomlu regluna um, at føroyingar áttu einarættin til sínar fiskileiðir uttan mark úteftir – søgulig rættindi, sum føroyingar eru einsamallir um á hesum leiðum.

Tingingar vórðu uppaftur tiknar í 1620 um fiskiskap og handil, og sáttmáli varð gjørdur 29. apríl 1621. Hesin sáttmáli gjørdi tó onga broyting í viðurskiftunum hjá enskum fiskimonnum. Teir høvdu roynt í mong ár undir Íslandi uttan loyvi, og nú hildu teir fram við loyvi frá kongi, men tó ikki nærri landi enn 8 fjórðingar.

Undir Føroyum afturímóti var eingin spurningur um mark í fjórðingum úr landi. Her galt tað um landgrunnin allan sum hann var (smb. »sight of land« ella landkenning). Tað tykist eisini prógvað í »instruks«, sum lensharrin Friedrich von Gabel gav eiðismanninum Nielsi Zachariassen sum strandvørði 3. mai 1698 fyri »... alle fiskemed fire mil [16 fjórðingar] nær omkring landet og længere i søen om muligt er...«. Tað var landgrunnurin, sum verjast skuldi móti útlendskum fiskiskapi (loynihandil var allar dagar annar tráðurin í siglingini), so tað rímar væl við gamla hugsan um rættindi til grunnin sum áður nevnt. Eisini donsk herskip fingu somu boð, og so seint sum í 1850'unum at halda útlendingum uttan fyri 16 fjórðingar úr landi.

Um 1750 fóru Norðurlond at nýta eitt sjómark uppá 1 míl (4 fjórðingar), fyrst bert sum friðarmark, men so við og við sum alment sjómark. Nakað seinni varð eitt sjómark uppá 3/4 míl (3 fjórðingar) tikið í nýtslu av londum sum Stóra Bretlandi, USA og Fraklandi.

– Hetta markið er grundað á hina sonevndu »goturskotslæruna« – fólkarættarlæruna um, at sjómarkið eigur at liggja so langt úti sum goturstykki bera av landi, sigur Dánjal Nolsøe og minnir á, at norðurlendska 4 fjórðinga markið einki samband hevur við hesa læruna og tí heldur ikki við 3 fjórðinga markið.

Eftir eitt rættarmál um eitt skip, sum varð tikið upp undir krígnum millum Danmark og Ongland fyrst í 19. øld, sendi Fríðrikur VI kongur 1812 soljóðandi boðskriv:

»Vi ville allernådigst have fastsat som regel i alle de tilfælde, hvor spørgsmål er om bestemmelsen af vor territorialhøjheds grænse ud i søen, at denne skal regnes indtil den sædvanlige sømils afstand fra den yderste ø eller holm fra landet, som ikke overskylles af søen; hvorom samtlige vedkommende de ved rescript ville blive at instruere.«

Hetta boðskriv varð kunngjørt fyri viðkomandi rættum og embætismonnum, men ikki prentað. Helst sipaði tað bert til friðarmarkið, ikki il fiskimarkið. 1 míla (4 fjórðinga) markið gjørdist tó skjótt alment sjómark í Danmark og Noregi – eisini fyri fiskiskap. Í Noregi var hetta markið vorðið alment um 1830.

Í hesum sambandi sigur Dánjal Nolsøe tað vera forvitnisligt at geva gætur, at donsk orlogsskip heilt upp til 1850-árini fingu fyriskipan um, at fiskimarkið uttan um tær donsku oyggjarnar í Norðuratlantshavinum var uppá 4 míl (16 fjórðingar).

### Føroyingar gingu ikki undir fast fiskimark

Við hinum sonevnda norðsjóvarfiskisáttmálanum frá 6. mai 1882 varð 3 fjórðinga markið avrátt sum fiskimark í Íslandi fyri Stóra Bretland, Týskland, Belgia, Holland og Danmark. Noreg og Svøríki vóru uttanfyri.

Seinast í farnu øld byrjaði bretska trolveiðan í Norðsjónum. Eftir nøkrum árum fór fiskamongin har at minka, og leitað varð so longur burtur, til Íslands, Biscayavíkina, Spania, Portugáls, Franska Vesturafrika og Barentshavið.

Í 1880-árunum fóru bretar at royna við línu undir Føroyum við guvudrivnum førum. Kalvin tók tá at minka nógv. Um summarið komu fyrstu trolskipini til Føroya, og tað í stórum. Nakað nógv útlendsk skip mundu hava verið undir landi – loynihandilsskip sum fiskiskip – tá ið Niels Zachariassen av Eiði fekk sjóverjuna undir hond í 1698, og aftur í 1898, tá ið enskir trolarar vóru tættir undir landi. Úr onkrari føroyskari bygd sóust 40 skip trola í senn nærindis landi. Støðan var so hættislig, at løgtingið ein sunnudag í advent samtykti at leiga skip sum verjuskip, og at siga hvørt oyra úr tingsins grunnum varð játtað til endamálið. Men tá kom verjuskipið »Guldborgsund« árið eftir – 1899.

Í løgtingsnevndaráliti frá 1898 er støðan lýst soleiðis:

»Skibene går aldeles rationelt til værks. Et antal af en halv snes skibe lægge sig i rad ikke fjernere end at redskabene ikke komme i kollision med hinanden, hvorefter trawlingen sker i samme retning for dem alle. Da garnet kun har en maskevidde af ca. 1 tomme, optager trawlet alt, hvad der findes på dets vej, lige fra den største helleflynder til den mindste fiskeyngel. Den yngel, som garnet ikke fanger, bliver enten knust af trawlbommen eller ødelagt ved at presses ind mellem den i garnet værende fisk. ... Det tegnede i forsommeren til en god fangst af kuller i farvandet ved den nordlige del af øerne; men den er totalt mislykket som følge af trawlernes virksomhed. Der er al mulig grund til at antage, at dette vil være føleligt i de pågældende bygder; thi kullerne have hidtil ved at tørres og opbevares til vinteren udgjort den overvejende del af føden, når uvejret i længere tid ikke tillader bådene at søge søen. For dampskibenes dristighed har i sommer ingen grænse været; de arbejde tæt ved land og inde på fjordene, således i sundet mellem Strømø og Østerø, hvor afstanden mellem landene ikke er mere end 1/8 mil. Rundt omkring fra kommer der da også nu klager i høje toner over de fremmedes fiskeri, og det er heller ikke uden ængstelse, at man kan se fremtiden i møde. Sommerfiskeriet er mislykket. Forrådskælderne ... ere tomme, og vinteren står truende for døren med udsigt til den samme fiskemangel som i sommer. Også vårfiskeriet, som skal give penge til indkøb til handelen, må befrygtes ødelagt for kommende år.«

Ringa skilið lýsir skaldið Jógvan Dánjalsson – Kvívíkar Jógvan – soleiðis í Trolaratáttinum:

*Bæði um dagar og nætur*
*ræna teir um vára strætir,*
*náttin, tað hon myrkir,*
*teir styrkir*
*Trolið verður sett,*
*veiðir hvítt og reytt,*
*livandi og deytt.*
*Teir frá botni sjabba*
*hvønn krabba,*
*føra heim á Bretland til abba.*

*Alt hetta ránsmannaræðið*
*verður okkum føroyingum skaði,*
*sum teir hervið blíva*
*at dríva;*
*hvør ger sum hann vil,*
*her er einki skil,*
*tá ber teimum til,*
*hvat vit so enn biðja og siga,*
*noyðast vit at tola tann sviða.*

Tað mundi mangan kennast føroyingum hart, at útlendingar trároyndu grunnin, sum føroyingar áttu, og ongin kundi sigast ringur fyri tað, at hann hevði ilt eyga til teirra, sum gingu hansara vinnuvegi ov nær ella eisini øvundaði teir, sum vóru teim fremri. Tað mundi eisini kennast sum ónáðir, tá ið føroyingar av álvara fóru at royna undir Íslandi frá skipi ella til lands. Dømi eru onkur, sum benda tann vegin, eitt nú í altingstíðindum 1875, har umrøddur er fyrispurningur til landshøvdingan viðv. løggávu um útlendskan fiskiskap við Íslands strendur.

Dánjal Nolsøe sigur, at meðan Ísland var saman við Danmark, høvdu føroyingar sum danskir ríkisborgarar somu fiskirættindi undir Íslandi sum íslendingar sjálvir. Aftan á 1943 tá ið Ísland varð leyst, varð enn í nøkur ár loyvt føroyingum at fiska innanfyri í Íslandi. Men fyrst í fimmtiárunum varð gjørt av, at føroyingar skuldu fara út um eins og aðrir útlendingar. Hetta økti um áhugan hjá føroyingum fyri fiskimarkinum heima. Mótvegis íslendingum gingu teir sáttmálaleiðina. Meðan teir higartil høvdu havt felags fiskimarkssøgu, dragnaðu føroyingar nú nakað afturúr íslendingum.

Ongland og Frakland hildu hvør sær 3 fjórðingar sum bæði territorial- og fiskimark. Tað vóru eisini hesi bæði londini, sum gingu undan at fáa onnur lond at taka eftir, og 6. mai 1882 gjørdu tey sum nevnt sáttmála við Holland, Belgia, Týskland og Danmark um fiskiskapin í Norðsjónum, men nøkur ár gingu – sløk 20 – til Føroyar og Ísland komu undir somu regluna, tí í 1901 eintust Danmark og Bretland í sáttmála at seta fiskimarkið til 3 fjórðingar undir Føroyum og Íslandi.

Men Poul Petersen, lic. jur., vísir í útvarpsfyrilestri á summarmála 1977 (s.á. sum fiskimarkið varð flutt út á 200 fjórðingar), á, at tað fyri vist kann sigast, at føroyingar ongantíð í søguni eru gingnir undir eitt fast fiskimark. At sáttmálin frá 1901 var bindandi fyri føroyingar sum fyri íslendingar er ein annar spurningur. Tað tykist afturímóti sum føroyingar yvirhøvur bæði fyrr og seinni hildu sær rættindi til landgrunnin, og tað er so týðuliga sagt í tveimum tingmálum serliga

